LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

**Løgtingið**

**Svar**
**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 032/2024 eftir tingskipanini § 52a til Aksel V. Johannesen, løgmann, frá Jørgen Niclasen, løgtingsmanni, um ógildan av uppsøgn av útbúgvingarstjóranum á Glasi**

**Fyrispurningurin var soljóðandi:**

1. Heldur løgmaður, at Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og undirvísingarmálum, hevur fyrisitið á fullgóðan hátt í málinum um ógildan av uppsøgn av útbúgvingarstjóranum á Glasi?
2. Hvørjar avleiðingar fær viðgerðin av hesum máli?
3. Ætlar løgmaður at geva boð um at ógilda afturkallingina av nevndu avgerð?

**Svar:**

**Til spurning 1**
Eg havi biðið Barna- og útbúgvingarmálaráðið um at ummæla teir settu spurningarnar. Aftaná at hava lisið ummælið dugi eg ikki at síggja, at landsstýrismaðurin við barna- og útbúgvingarmálum í málinum hevur borið seg soleiðis at, at hann politiskt ella rættarligt eigur at ábyrgdast fyri tað. Hóast fyrisitingin hjá landsstýrismanninum viðgongur, at har eru hendir óhepnir fyrisitingarligir feilir í málinum, so eru hetta tó feilir, sum eru hendir á fyrisitingarligum støði og sum landsstýrismaðurin ikki kann ábyrgdast fyri.

**Til spurning 2**
Eg ivist ikki í, at landsstýrismaðurin fer at taka málið upp innanhýsis í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum. Sjálvur havi eg heitt á landsstýrismannin um at tryggja at slíkt mistak ikki hendir aftur.

**Til spurning 3**
Eftir stýrisskipanarlógini § 33 býtir løgmaður málsøki landsstýrisins millum landsstýrisfólkini. Landsstýrisfólkini sita fyri málsøkjum sínum hvør sær. Eg havi tí ikki heimild at geva boð um at ógilda avgerðina.

Í Tinganesi, 30. september 2024

Aksel V. Johannesen
løgmaður

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – e-mail: info@tinganes.fo - www.lms.fo